52-100/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 100/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Tordi Niclasen, løgtingsmanni, um landsstýrismaður situr fyri málsøkinum á fullgóðan hátt

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Heldur løgmaður, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum situr fyri sínum málsøki á fullgóðan hátt í samband við ætlaðu avtøkuna av aldursmarkinum ?
2. Um løgmaður ikki heldur, at landsstýrismaðurin situr fyri sínum málsøki á fullgóðan hátt, hvørji stig ætlar løgmaður tá at taka ?

Svar:

Spurningur 1-2
Stýrisskipanarlógin § 33 stk. 3 sigur at "løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt."

Hitt fyrra er eitt løgfrøðiligt eftirlit at ansa eftir at landsstýrismaður ber seg lógliga at. Hitt seinna er eitt politiskt eftirlit hjá løgmanni at ansa eftir at landsstýrismaður ber seg politiskt at á ein hátt, sum kann góðtakast.

Eg havi fyrilagt spurningin fyri landsstýrismannin í fíggjarmálum, sum sigur soleiðis:

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur gjørt uppskot um at broyta fráfaringaraldurin í stigum og í fyrsta umfari at hækka fráfaringaraldurin úr 70 ár til 72 ár. Hetta hevur verið viðgjørt á landsstýrisfundi, har landsstýrismaðurin hevur fingið undirtøku fyri at senda uppskotið í hoyring.

Uppskotið verður mett at verða ein stórur bati á økinum. Tí hóast fráfaringaraldurin ikki verður avtikin heilt á hesum sinni, so verður tað møguligt at vera munandi longri á arbeiðsmarknaðinum hjá teimum, sum ynskja tað. Fyri tað fyrsta verður møguligt at verða á arbeiðsmarknaðinum 5 ár eftir at starvsfólkið hevur rokkið fólkapensjónsaldur. Og harafturat hevur arbeiðsgevarin møguleika at leingja setanina 2 ár í senn, eftir at starvsfólkið er vorðið 72 ár. Tá ræður um at leingja setanina eftir at starvsfólkið er 72 ár, verða tað førleikarnir, ið koma at avgera um ein slík leingjan av setandi kann verða gingin á møti. Á tann hátt ber til at siga, at tað verða førleikarnir og ikki aldurin sum koma at avgera hvussu leingi eitt starvsfólk kann verða á arbeiðsmarknaðinum eftir at starvsfólkið er fylt 72 ár. Øll fáa tó – í minsta lagi - møguleika at arbeiða til tey eru 72 ár.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Samanumtikið verður mett, at við ætlaðu broytingunum, verður endamálið, sum lýst í samgonguskjalinum – um at loyva teimum sum ynskja at vera longri á arbeiðsmarknaðinum – rokkið. Samstundis verður mett, at størsti parturin av arbeiðsfjøldini, ið ynskja tað og sum hava neyðugu førleikarnar til arbeiða eftir at tey eru fylt 72 ár, fáa tann møguleikan við hesum broytingunum. Málið er tó framvegis at avtaka fráfaringaraldurin og tí verður hendan skipanin eftirmett, tá ið hesar broytingarnar hava staðið sína roynd í eina tíð.

Eg kann við hesum staðfesta, at landsstýrismaðurin hevur valt eina hóvliga tilgongd, har fráfaringaraldurin verður hækkaður til 72 ár, harumframt verður møguligt at leingja við tveimum árum í senn. Síðani skal skipanin eftirmetast, tá hon hevur staðið sína roynd í eina tíð.

Í Tinganesi, 15. desember 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður